# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Peugeot 908 RC:

# Liggjandi leyva við 300 km/t

**Á altjóða bilaframsýningini í Paris sýna Peugeot ein villan konseptbil. Talan er um 908 RC við 5,5 litur V12 HDI turbo dieselmotori við 700 hk og tveimum sótfiltrum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tey flestu eru ivaleyst samd um, at hesin Peugeot 908 RC sær út av nøkrum. Sannleikin er, at hann bæði sær út av nøkrum og er nakað. Við V12 motori við 700 hk upp á tvørs, framman fyri bakaksulin, og automatiseraðum 6-trins girkassa, hevur bilinum eina toppferð upp á yvir 300 km/t. Bilurin hevur 20" hjól framman og 21" aftan.

Peugeot eru kendir fyri sítt logo við eini leyvu í, og designið skal minna um eina liggjandi leyvu.

Designið hava Peugeot sjálvir staðið fyri. Forrúturin er sera stórur og gongur langt aftur á takið fyri at geva føraranum gott útsýni. Í kabinuni er alt leður, træpanelir og polerað aluminium. Ivasamt er um júst hesin bilurin verður framleiddur. Hann er mest gjørdur fyri at vísa, hvussu vit kunnu vænta, at Peugeot bilarnir koma at síggja út í framtíðini.



*Peugeot 908 RC. Designið minnir um eina liggjandi leyvu. Hurðahandtøkini eru fjald*



*Úr hesum vinklinum sæst, at motorurin situr aftan*



*Alt takið glas. Forrúturin og takið ganga í eitt*


*Designið skal minna um eina liggjandi leyvu*


*Peugeot 908 innan. Bilurin er sera framkomin í allar mátar*